# Stjørnuskot úr Runavík



*- Eg havi bara roynt at arbeitt fyri mínum møguleika. Og so havi eg roynt at tikið av, nú tá hann kom, heldur Einar Hansen um gjøgnumbrotið, sum hann í ár hevur fingið*

Í fjør var navnið á 17 ára gamla Einari Hansen neyvan nakað, sum fólk uttan fyri NSÍ bitu nakað serligt merki í. Alt í alt gjørdist talan bara um tríggjar upptraðkanir á besta liðnum hjá vespunum hetta kappingarárið, og tó at evnini vóru hampuliga sjónlig, so var hetta altso ikki nakað, sum stórvegis merki varð bitið í. Í øllum førum ikki hjá teimum, sum ikki fylgdu NSÍ heilt nær.

Í ár hevur talan tó verið um stóra broyting í so máta. Longu í næsta dystinum í Formula-deildini varð Sjúrður Jacobsen skaddur, og so var tørvur á nýggjum manni at røkta plássið, sum Sjúrður frísparkssjúttin av Langanesi hevur sitið rimmar fastur á í skjótt drúgt áramál.

Og hetta gjørdist møguleikin hjá Einari. Uttan stórvegis hóvasták spældi hann seg alt fyri eitt inn í hitan við støðugt góðum avrikum, sum annars plaga at hoyra meira royndum spælarum til. Og í dag snýr tosið í Runavík seg meira um, hvørt Sjúrður yvir høvur fær plássið aftur, heldur enn nær hann verður tøkur aftur.

Sjálvur tykist Einar tó taka tað heilt róligt. Og í øllum førum vóru beinin plantað væl og virðiligani á jørðini, tá vit fingu orð á hann eftir dystin á Eiði.

- Eg havi bara roynt at arbeitt fyri mínum møguleika. Og so havi eg roynt at tikið av, nú tá hann kom.

*Og nógv hava tosað um, at tú nú situr væl og virðiliga á plássinum. Kennir tú tað eisini soleiðis sjálvur?*

- Tað veit eg ikki. Eg royni sum sagt at arbeiða fyri mínum kjansi. Men eg haldi í øllum førum ikki, at eg verið settur á beinkin alt fyri eitt, sum næsti maðurin er tøkur.

Tá ein ungur spælari somikið brádliga trínur á pallin, plagar tosið um fótbólt uttan fyri landoddarnar eisini at fáa ferð á. Og soleiðis tykist tað eisini vera við Einari.

Sjálvur vil hann tó ikki siga nakað serligt um hetta. Heldur ikki tá tað verður spurt beinleiðis, um tað ikki er nakað um tosið, tá sagt verður, at tað ikki er við NSÍ, at hann skal spæla, tá vit koma út í juli mánað.

- Tað kann kanska verða, at eg missi onkrar dystir tá, men tað fái eg so ikki sagt nakað um í løtuni, sigur fryntligi og næstan smædni unglingin at enda.

Hvussu er og ikki, so er einki at ivast í, at verður talan um lítla fráveru, so er hendan bara fyribils. Tað tykist í øllum, sum er róliga medferðin garantur fyri, at fótbóltsevnini verða gagnnýtt optimalt, og verða tey tað, so verður kanska heldur ikki so øðiliga leingi, áðrenn landsliðsvenjararnir kunnu royna at brúka Súna Olsen longur frammi á vøllinum.

EB/Stre

# Dýrir av

**EB/Streymur hevði fleiri møguleikar at lukka dystin móti NSÍ, men teir tóku ikki av. Og so máttu teir rinda prísin, tá risa-dropp hjá málverjanum kostaði tvey stig**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Sofus D. Johannesen*

Hóast sorgin framhaldandi hevur fast tak á teimum, sum spæla við felagsliðnum hjá EB/Streymi, so gongur landskappingin sína vanligu gongd.

Leygardagin enntá við einum steypi sum eykavinningi, tá NSÍ kom á vitjan sum stevnugestir.

## Ivasamar umskipanir

Ivaleyst mundu áskoðararnir iðra seg um, at kapproðurin hevði flutt dystin til kl. 18 á kvøldi. Í øllum førum hevði sólin sæð mest sum allan dagin, men út á kvøldið tók at regna, soleiðis at fótbóltslíkindini versnaðu nakað.

Nakað av vindi var eisini eftir vøllinum, og fyri steðgin høvdu vertirnir hendan í baki. Serliga fyrstu løtuna høvdu runavíkingarnir ilt við at venja seg við umstøðurnar, men spakuliga megnaðu teir tó at byggja nakað av spæli niðan eftir vøllinum.

Tað vóru tó EB/Streymur, sum fyri tað mesta royndu at trýsta. Liðið var nakað umskipað við Egili á Bø sum áleypara og einari miðverju við Andrzej Pacek og Fróða Clementsen, og til tíðir var trupult at síggja tað skilagóða í hesum. Einar tvær ferðir smoygdi Ike sær frá Fróða Clementsen, uttan at hetta tó gav mál av sær, og hjá Pacek tóktist navnabrævið í fleiri førum at vera farið framvið tí, sum vanliga verður mett galdandi til fótbólt í fremstu røð.

Og spurningurin tóktist eisini vera, hvussu skilagott tað var við Egili heilt frammi í álopinum. Gaman í vinnur hann nógvar bóltar í luftini, men flytingarmynstrið var fyri tað nógva merkt av, at hann í fleiri ár hevur spælt í verjuni, og tí spurdist sjáldan nakað burtur úr kropsligu styrkini.



## Løtan hjá NSÍ

NSÍ royndi í fleiri førum at kontra, og teir komu eisini fram til møguleikar. Ikki minst kundi Jónstein Petersen skorað, tá hann fangaði sløsuta afturlegging, men hann var ikki nóg kaldur í avgerandi løtuni. Men tað eydnaðist kortini NSÍ at koma á odda eftir at eitt av skjótu álopunum gav hornaspark.Og tey, sum hava sæð lið hjá Trygva Mortensen spæla, vita, at deyðbóltar altíð eru vandamiklir.

Tað líktist eisini eini væl vandari støðu, tá Brynjálvur Nielsen sera neyvt sparkaði bóltin móti nærmasta stólpa, og har var Helgi L. Petersen hægstur og stýrdi bóltinum í kassan.

Og eftirfylgjandi hevði NSÍ sína bestu løtu í øllum dystinum. Framvegis lótu teir vertirnar trýsta, men tá gestirnir so vunnu bóltin, varð full ferð sett á. Kantarnir báðir við Jónstein og Christian Høgna vórðu nógv nýttir, men veruligar opnar kjansir gjørdist talan tó ikki um.



*Við fingrunum peikandi upp í loft ognaði Sorin Anghel nú fyrrverandi liðfelaganum málið, tá hann skeyt EB/Streym upp á 2-1*

## Hans Pauli í serflokki

Og spakuliga kom EB/-Streymur eisini fyri seg. Og ikki minst Hans Pauli Samuelsen. Er lagið tað rætta á honum, er hann einsamallur mest sum allan atgongupeningin verdur, og lagið var gott hesaferð. Ikki minst er tað stuttligt at síggja, hvussu hann altíð sleppur sær úr trupulleikum við driblingum, fintum og